LM-066/2023

FÆRØERNES **POLITI**

Dato: 14. december 2023
J.nr.: **5600-10167-12-23**

ANKLAGEMYNDIGHEDEN
Húsagøta 3
Postbox 3018
110 Tórshavn
Tlf. +298 351448

Fylgiskjal 8

Uttanríkis- og vinnumálaráðið
Tinganes

Føroya Politi hevur fingið uppskot til broyting í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg (Vinnufelagalógin), anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om visse erhvervsdrivende virksomheder (Vinnufyritøkulógin), anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde og í løgtingslóg um tryggingarvirksemi (Innheinting og skráseting av upplýsingum um veruligar eigarar, tvingsilsavtøka o.a.) til ummælis.

Í uppskotinum verður m.a. í fleiri ásetingum víst til, at ávísar upplýsingar kunnu latast til Føroya Landfúta, og at Føroya Landfúti kann geva upplýsingar víðari til aðrar myndugleikar.

Føroya Politi er av teirri fatan, at Føroya Politi ikki er rætti myndugleiki at vísa til, av tí at Føroya Politi ikki er kompetentur myndugleikin á økinum.

Av tí at talan er um vinnulóggávu og upplýsingar um veruligar eigarar, er tað møguligt, at tað er Hvidvasksekretariatet, sum vísast skal til, eins og tað verður gjørt í danskari lóggávu. Føroya Politi mælir tó Uttanríkis- og vinnumálaráðnum til at seta seg í samband við Erhvervsministeriet, sum er avvarandi myndugleiki í Danmark, um hetta.

Føroya Politi biður um umbering fyri seina svarið.

Vinarliga

Katrin Thorsvig Hansen
Høvusákæri